## Meiri virkið felag

Nývaldi formaðurin í Maskinmeistarafelagnum, Páll Hansen, ætlar sær at virka fyri, at felagið verður meiri virkið, enn tað hevur verið. Harafturat ætlat hann sær at virka fyri at fáa Útbúgvingarráðið at virka. Páll Hansen sigur við Útvarpið, at eftir hansara tykki er útbúgvingarstøðið á Vinnuháskúlanum lækkað, og tí má ráðið fáast at virka. Men stjórin á Vinnuháskúlanum, Hans Johannes á Brúgv, vísir aftur, at útbúigvingarstøðið er lækkað.

## Handilin verri fyri

Ein av teimum ábendingunum, sum kemur fram á nýggja konjunkturbarometrinum hjá fíggjarmálaráðnum, er, at handilsvinnan hevur tað ikki so gott nú sum fyri einum hálvum ári síðani. Í sambandi við metingina er handilsvinnan spurd um sølu, bíleggingar og arbeiðstørv, og samlaða treystistalið, sum vísir støðuna, er fallið níggju prosent tað seinasta hálva árið. Men tað nýtist ikki vera negativt, sigur landsstýrismaðurin Bárður Nielsen.

Fíggjarmálaráðið gjørt konjunkturbarometur:

# Boðar frá komandi sveiggjum í búskapinum

**Í Føroyum er hatta nakað nýtt, men í øðrum londum hava tey havt hetta amboðið í nógv ár, konjunkturbarometrið.Tað gevur eina mynd av, hvussu nakrir lyklabólkar í samfelagnum meta um gongdina í búskapinum. Fyrstu úrslitini skulu tó tulkast varliga, sigur bólkurin, ið hevur staðið fyri kanningini**

BÚSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Báðrur Nielsen, fíggjarmálaráðharri, og Mortan Simonsen, formaður í bólkinum, ið hevur staðið fyri kanningunum í sambandi við konjunkturbarometrið.*

*Mynd: Jens Kr. Vang.*

Fíggjarmálaráðið hevur latið eina kanning kunngerða, tað sonevnda konjunkturbarometrið.

Talan er um vísitøl, ið siga nakað um, hvussu brúkararog ávísir vinnubólkar meta búskaparligu tíðirnar at vera.

Tað er sostatt ikki talan um verulig afturlítandi tøl, men um metingar av búskaparligu gongdini í samfelagnum. Hetta er galdandi bæði fyri gongdina í løtuni og fyri metingar um vánirnar í framtíðini.

- Í Føroyum er tørvur á hagtøkujm og vísitølum, og tí er tað eitt framstig, at vit nú fáa konjunkturbarometrið. Við tíðini verður hetta eitt gott amboð og ískoyti hjá teimum mongu, ið eygleiða gongdina í búskapinum segði Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Tøl av hesum slag hava í fleiri ár verið nýtt í londunum uttan um okkum, og geva eina góða meting av, hvussu konjunkturarnir eru og fara at verða.

Bárður Nielsen sigur, at konjunkturbarometrið fer at verða eitt týdningarmikið amboð tá eitt nú nýggj fíggjarlóg skal smíðast.

### Tulka varisliga

Formaðurin í bólkinum, sum hevur staðið fyri kanningini, er Mortan Simonsen, ráðgevi í Fíggjarmálaráðnum.

- Tílíkar kanningar hava víst seg ofta at geva fyrstu ábendingarnar um eina vend í búskapinum, áðrenn vanligu búskaparhagtølini eru gjørd upp, sigur Mortan Simonsen.

Konjunkturbarometrið er ein kanning, ið er gjørd millum 5 bólkar. Hesir eru brúkarar, har Gallup spyr 500-600 tilvildarliga vald húski um teirra peningaviðurskifti, og hartil fýra vinnubólkar, har eitt fast úrval av virkjum, ið umboða hvønn sín vinnubólk, verða spurd um ymiskt í sambandi við keyp og sølu, arbeiði o.a. Teir fýra vinnubólkarnir eru tilfeingisvinna, byggivinna, handilsvinna og tænastuvinna.

Spurningarnir eru ymiskir fyri hvønn bólk sær og somuleiðis eisini við svarmøguleikunum. Spurningarnir eru teir somu her í Føroyum, sum í hinum 30 londunum, sum luttaka í sonevnda ECFIN-samstarvinum.

Lagdur verður dentur á, at hesi fyrstu tølini eiga at verða tulkað varisliga. Hetta serliga tí, at kanningarnar eru so nýggjar, og veruligt sammetingargrundarlag ikki fæst, fyrr enn vit hava gjørt hesar kanningar í nøkur ár.

Kanningarnar ganga í stuttum út uppá, at brúkarar og vinnubólkar verða biðin at svara positivt ella negativt upp á ávíst tal av spurningum. Sveiggið í svarunum liggur millum –100 og +100. Ein av spurningunum til húskini var, um ætlanin var at keypa ella byggja hús komandi 12 mánaðirnar. Í trimum kanningum, sum higartil eru gjørdar, fingu svarini nettostigini –84, -86 og –83. Hetta sigur tó ikki annað enn, at flestu húski ikki ætla at keypa ella byggja hús komandi árið.

Fíggjarmálaráðið upplýsir, at ætlanin er at gera hesar kanningar tvær ferðir um árið, og verða hesar lagdar fram 15. februar og 15. juli á hvørjum ári.

Páll vil avlasta Høgna Hoydal:

# Hetta er ikki viðgjørt í flokkinum

**Í blaðnum í gjár bleiv í sambandi við avlýsta næstformansvalið í Tjóðveldisflokkinum sagt, at Páll á Reynatúgvu tók seg aftur sum næstformansvalevni, men fegin vildi avlasta tingformann floksins. Men hetta kennir Høgni Hoydal einki til**

FLOKSTING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Páll á Reynatúgvu, tingmaður úr Sandoynni, var av sínum valfelag skotin upp til næstformann í flokkinum, men tá valið skuldi avgerast á flokstinginum fríggjakvøldið, steik Páll upp á pallin og boðaði frá, at hann tók seg aftur sum valevni til næstformann í flokkinum.

Samstundis nevndi hann, at hann í staðin fegin vil avlasta tingformannin í Tjóðveldisflokkinum, men hetta kom púra óvart á Høgna Hoydal, sum er verandi tingformaður.

- Jú, eg hoyrdi Páll og tað, hann segði, men hetta er ikki nakað, vit í flokkinum hava tosað um, sigur Høgni Hoydal.

Formaður Tjóðveldisflokksins sigur seg ikki vita, hvat Páll á Reynatúgvu sipar til, men tað er jú ikki eitt mál fyri flokstingið. Hetta er nakað, sum tingmanningin ger av.

- Sjálvandi eru slík mál uppi og venda av og á, men tað er púra ókent fyri mær, at Páll vil avlasta meg, og tí fái eg so lítið sagt um hetta, sigur Høgni Hoydal.

Páll á Reynatúgvu sjálvur var neyvan til at misskilja á flokstinginum, og endurgav eisini fyri blaðmanni Sosialsins ynski sítt, at hjálpa og avlasta tingformann Tjóðveldisfloksins. Hvørjum hetta fer at enda við, má so bara tíðin vísa.



*Høgni Hoydal kennir onki til nakra ætlan um at skifta formannin fyri tingbólkin út*

*Mynd: Leo Poulsen*